HER arbeiði EG

**Eilen Anthoniussen** eilen@sosialurin.fo



# Djórunum tørva eisini hjálp

**Fyri Berg Hanusson hevur tað altíð snúð seg um at hjálpa, og fyri hann er arbeiðið sum djóralækni ongantíð keðiligt. Tað inniber uppgávur sum at operera nálir úr einum kettubúki, at reinsa hundatenn, og gelding av djórum av ymsum støddum, bara fyri at nevna nakrar uppgávur**

Á heimasíðuni hjá Djóralæknatænastuni, sum heldur til við Varðagøtu í Havn, ber til at lesa um alskyns viðurskifti í samband við djór. Harímillum er ein søga at finna á síðuni um eina tík, sum fekk átta hvølpar við einum keisaraskurði, og tveir Yorkshire Terrier, sum hava reinsað sínar tenn. Her arbeiða tríggir djóralæknar, ið allir eru útbúnir á Den Kongelige Veterinær- og Landbohøjskole í Keypmannahavn. Hvønn yrkadag millum klokkan 8-16.00 ber til at koma á Djóralæknatænastuna við sínum sjúku djórum, ella at ringja og fáa eitt prát við djóralæknan um eitthvørt. Seinnapartar arbeiða djóralæknarnir við skurðviðgerðum ella eru úti og vitja størri djór, sum neyt og ross. Men tænastan hjá djóralæknanum er 24 tímar um døgnið, og tí ber altíð til at fáa fatur á einum djóralækna.

- Tað er fyri tað mesta hundum, vit arbeiða við. Harafturat koma kettur, og so kaninir, marsvín og onnur smádýr, umframt seyð, neyt og ross. Arbeiðið hjá okkum broyttist nógv eftir 1995, tá lóggávan fyri innflutningi av djórum varð broytt til at øll djór kunnu innflytast. Einasta treyt er, at tey eru koppsett og viðgjørd fyri sníkar, greiðir Bergur Hanusson frá.

### Frá Labradorum til Chihuahua

Vanligu sjúklingarnir hjá Djóralæknatænastuni eru í bókstavligastu merking tódnaðir niður í rottustødd. Frá tí at fólk vanliga innfluttu stórar hundar, so sum



*Djóralæknatænastan við Varðagøtu er sera væl útgjørd, og minnir ikki sørt um arbeiðsrúmið hjá einum vanligum lækna. Saman við øðrum hevur Bergur Hanusson bygt Djórlæknatænastuna upp*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Ein partur av arbeiðnum hjá djóralæknanum er telefonviðtala, ið fer fram fyrrapartar. Tá verður nógvur heilivágur útskrivaður, sum kann heintast á einum av apotekunum kring landið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*